# Kappkoyring fyri kassabilar í Skopun

## Næsta leygardag, tað er 5. juli, verður ein rættiliga sermerktur familjudagur í Skopun

**Áki Bertholdsen**

Nógv er á skránni, men høvuðstiltakið verður ein kappkoyring, sum neyvan nakrantíð áður hevur verið í Føroyum.

Tað er ein kappkoyring, har kassabilar fara at koyra kapp.

– Tað er best at melda til, men møtir onkur bara upp, finna vit saktans út av tí, sigaa Kristvør og Eivind Kolden, hava tikið stig til hendan familjudagin.

Tey siga, at umframt úr Sandoy, hava tey frætt um, at áhugi er fyri kappkoyringini bæði í Havn og í Suðuroy.

Í kappkoyringini verða tríggjar virðislønir, ein fyri skjótasta bil, ein virðisløn er til tann tryggasta bilin og ein virðisløn er til tann stuttligasta ella sermerktasta bilin.

Annars verður bygdartorgið mitt í bygdini karmur um tiltakið, har spæl í ánni og har rundanum fær ein týðandi leiklut á hesum familjudegnum.

Annars verður ymiskt annað á skránni og í bygdarhúsinum verður matsøla og sølutorg, har fólk eisini kunnu leiga sær eitt borð at selja tað, tey einaferð hava at selja av heimavirkaðum, ella øðrum.

Ætlanin er, at familjudagurin byrjar klokkan 14, tá ið Teistin kemur av Gomlurætt.

Tá verður skrúðgonga, eftir ætlanin við luttøku av ellisakførum úr Havn, niðan á torgið, har dagurin verður settur.

Aftan á kappkoyringina verður konsert, har fólk úr bygdini fara at spæla og syngja, eitt nú Malena, Emma Randarsól og veteranurin, Fríðbjørg Jensen, og endað verður við einum felagskirkjuligum sangkóri.


Tey siga, at hepnast familjudagurin væl hesa ferð, er væl hugsandi, at tað verður eitt afturvendandi tiltak, og skuldi nakað lopið av, tá ið kassin verður gjørdur upp, verður tað brúkt til at skipa fyri einum sama slag tiltaki næsta ár.

*aki@sosialurin.fo*



## HÓSDAG

**8/11 °C**



1-6 m/s 1-6 m/s

**Seinnapart:**
Fleyr til gul av eystri ella av ymsum ættum, turt og sólglottar. Hitin millum 8 og 11 stig.

## FRÍGGJADAG

**7/10 °C**



1-6 m/s 1-6 m/s

Fleyr til gul av ymsum ætttum, turt og sólglottar. Hitin millum 7 og 10 stig.

## LEYGARDAG

**8/11 °C**




3-8 m/s 3-8 m/s


Lot til andøvsgul av landnyrðingi og sólglottar, men kanska okkurt æli. Hitin millum 8 og 11 stig.

**Veðrið sunnudagin og mánadagin:**
Sunnudagin lot av landnyrðingi og okkurt æli, mánadagin lot av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 9 og 13 stig.

## LUFTTRÝSTIÐ




**Hósmorgunin:**
Eitt hátrýst, 1025 hPa. í landnyrðing úr Føroyum stendur mestsum í stað og viknar nakað.




**Fríggjanáttina:**
Hátrýstið í landnyrðing úr Føroyum stendur mestsum í stað, men viknar framvegis.

in.fo

Tíðindaportalurin hjá Miðlahúsinum

...fyrst og fremst

www.in.fo



**Petur Skeel Jacobsen** greiðir frá um veðrið

## VESTFALLSKYRRINDI

3/6: Mánin longst frá jørðini
5/6: Fyrra kvarter

Kelda: Almanakkin 2014

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | Suðuroyar-/Vágafirði sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | Hestfirði/Sundalagnum sp. | Vestmannasundi fp. | Vestmannasundi sp. | Mykinesfirði fp. | Mykinesfirði sp. | Nólsoyarfirði fp. | Nólsoyarfirði sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði sp. | Hvannasundi fp. | Hvannasundi sp. | Fugloyarfirði fp. | Fugloyarfirði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 26. juni | 06:46 | 19:11 | 06:46 | 19:11 | 06:46 | 19:11 | 06:46 | 19:11 | 06:46 | 19:11 | 06:46 | 19:11 | 06:46 | 19:11 | 06:46 | 19:11 | 06:46 | 19:11 | 06:46 | 19:11 | 06:46 | 19:11 |
| 27. juni | 07:35 | 19:59 | 07:35 | 19:59 | 07:35 | 19:59 | 07:35 | 19:59 | 07:35 | 19:59 | 07:35 | 19:59 | 07:35 | 19:59 | 07:35 | 19:59 | 07:35 | 19:59 | 07:35 | 19:59 | 07:35 | 19:59 |
| 28. juni | 08:21 | 20:44 | 08:21 | 20:44 | 08:21 | 20:44 | 08:21 | 20:44 | 08:21 | 20:44 | 08:21 | 20:44 | 08:21 | 20:44 | 08:21 | 20:44 | 08:21 | 20:44 | 08:21 | 20:44 | 08:21 | 20:44 |
| 29. juni | 09:05 | 21:27 | 09:05 | 21:27 | 09:05 | 21:27 | 09:05 | 21:27 | - | 12:05 | 09:05 | 21:27 | 09:05 | 21:27 | 09:05 | 21:27 | 09:05 | 21:27 | 09:05 | 21:27 | 09:05 | 21:27 |
| 30. juni | 09:48 | 22:09 | 09:48 | 22:09 | 09:48 | 22:09 | 09:48 | - | 00:27 | 12:48 | 09:48 | 22:09 | 09:48 | 22:09 | 09:48 | 22:09 | 09:48 | 22:09 | 09:48 | 22:09 | 09:48 | 22:09 |